# Sólja formaður í Fólkafloksungdómi

UNGDÓMSPOLITIKKUR
Fólkafloksungdómur

Fólkafloksungdomur hevði aðalfund friggjadagin, 30. november 2001. Aftan á aðalfundin var hugnakvøld. Áðrenn sjalvan aðalfundin var orðaskifti um bustaðarviðurskiftini - serliga hjá ungdóminum - og um borgarligan politikk. Jan Christiansen, borgarstjori í Havn, greiddi fyrst frá, hvussu kommunan roynir at loysa trupulleikan og hvat Fólkaflokkurin i býráðnum ger í hesum málinum.

Óli Breckmann, formaður Fólkafloksins á tingi, greiddi síðan m. a. frá um uppskot Folkafloksins um skattalætta á leiguinntøkum hja teimum, ið leiga part av egnum húsum út. Aftan á var nevndarval á skránni, og er nevndin nú mannað soleiðis:

Sólja Jóanisdottir, *formaður*
Torkil V. Rasmussen, *skrivari*
Tummas Pauli Djurholm, *kassameistari*

Teir báðir, Torkil og Tummas Pauli, eru afturvaldir, meðan Sólja Fríða er nývald. Triði nevndarlimur í gomlu nevndini, Hallur O. Gunnarsson, bar seg undan afturvali. Tiltakslimir í nýggju nevndini eru Turid Christophersen og Fróði Sørensen.

Seinasta punktið á skránni var kjak um virkisætlanina fyri komandi ár. Á fundinum vóru nógv góð uppskot til ymisk tiltøk, felagið eigur at fremja komandi ár, og fekk nývalda nevndin til uppgavu at gera eina endaliga virkisætlan at leggja fyri næsta fund í felagnum.

Á aðalfundinum var eisini nýggja heimasíðan hja Fólkafloksungdómi, huxa.fo, løgd fram. Á heimasíðuni kanst tú finna upplýsingar um Folkafloksungdóm, og hvat felagið tekst við. Tað ber til at tekna seg sum lim i felagnum á heimasi?uni. Eisini kunnu limirnir og onnur áhugað siga sína huxan um ymisk mál sum eru uppi í tíðini, m.a. sjálvstýrispolitikk, skattamál, ungdómsspurningar, bústaðarviðurskifti og privatisering, sigur Fólkafloksungdómur í tíðindaskrivi.

VIÐMERKINGAR

## Landstýrið tekur uttan eitt orð frá kommununum

**Finnleif Guttesen**
*borgarstjóri*

At løgmaður í sjónvarpinum sigur at Finnleif Guttesen og aðrir kommunupolitikarar ikki skulu óttast tað, sum samgongan er í holt við viðvíkjandi pensiónum, so kunnu Finnleif Guttesen og aðrir kommunupolitikarar illa trúgva orðunum hjá løgmanni.

Niðanfyri vísta gongd vísur nakað heilt annað, hetta dømi er fráTvøroyri og vísur hvussu landstýrið hevur minka inntøkurnar hjá kommununi .

Gjald til landsvegagrunnin, sum kommunurnar vóru trektar fyri, var ólóligur og bleiv tí avtikin, samtíðis bleiv asfaltstudningurin til kommunurnar avtikin.

FAS skipaskrásetingarskipanin hevur koyrt í fleiri ár og kommunurnar eru trektar fyri gjaldið ,uttan møguleika fyri at stoppa tíð. Hendan skipan, sum landstýrismaðurin í fiskivinnumálum sigur er eitt gullnám, er bert ein stór útreiðsla fyri flest allar kommunur.

Omanfyri vístu dømir vísa klárt, hvussu samgongan við sínum fíggjarpolitikki niðurbindur kommunurnar, Tvøroyrar kommuna hevur uppá tvey ár mist 5,5 mill. krónur, sum vit kundu hava niðurgoldið skuld ella gjørt nógv ymisk tiltrongd arbeiðir í kommununi við.

Tað er lætt, at reypa av givnum skættalatta og hækkaðum pensiónum, tá ið kommunurnar skulu gjalda uttan at verða eftirspurdar yvirhøvur.

| | Ár 2001 | Ár 2002 |
|---|---|---|
| Botnfrádráttur | 700.000 | 1.400.000 |
| Landsvegagrunnur | 800.000 | 0 |
| Pensiónsfrádráttur | 0 | 1.800.000 |
| Inntøku missur | 1.500.000 | 3.200.000 |
| Asfaltstudningur | - 180.000 | 0 |
| **Inntøku missur íalt** | **1.320.000** | **3.200.000** |
| + Gjald til FAS | 500.000 | 500.000 |
| **Álagt gjald frá landinum** | **1.820.000** | **3.700.000** |

# Óheppið at senda pening uttanlands

**Viðmerking frá Postfelagnum til grein í bløðunum um donsku innkrevjingarnar hjá Tryggingarfelagnum**

TRYGGING
*Postfelag Føroya*

– Sum kunnugt hevur Tryggingarfelagið sent donsk girokort til viðskiftafólk síni. Postfelag Føroya heldur tað vera ógvuliga óheppið, at ein føroysk fyritøka velur at senda peningin, sum føroyingar inngjalda, til Danmarkar.

Hetta sigur Postfelagið í tíðindaskrivi. Felagið sigur víðari, at Tryggingarfelagið Føroyar hevur fyrr nýtt føroysk girokort, og peningurin er farin á føroyskar kontur. Hettar hevur riggað væl. Viðskiftafólk postverksins eru nú ógvuliga misnøgd, tí postgjaldið er sjálvandi hægri fyri eina inngjalding til Danmarkar enn í Føroyum.

Annars er at viðmerkja, at Postverk Føroya hevur havt eina “Gjaldtænastu” í 15-20 ár.

# Nú ber av, Høgni !

**Lisbeth L. Petersen**
*Sambandsflokkurin*



Høgni Hoydal, landsstýrismaður og formaður Tjóðveldisfloksins, er aftaná vitjan Anders Fogh Rasmussens farin at filosofera yvir leiklutin hjá donsku stjórnini í føroyskum politikki, og ger tað í grein, sum hann nevnir ”Eg sigi tað við babba !”.

Kanska skuldi Høgni funnið sær eina aðra yvirskrift, tí tey, sum síggja hana, kundu lættliga fingið assosiasiónir um hin mannin í London!

Men nú er greinin vend soleiðis, at Høgni brúkar heitið m.a. í sambandi við Sambandsflokkin, og undirritaða verður eisini nevnd saman við Marjusi Dam, løgtingsmanni.

Ikki sørt ósmæðið av Høgna Hoydal og hartil rættiliga nasadjarvt av manninum, sum annars alfaðirliga formanar onnur til sakligheit, tá hann nú skírir Sambandsflokkin at vilja ”keypa sær vinir” fyri danskar pengar ! hvat billar landsstýrismaðurin sær inn at koma við tílíkum skuldsetingum ?

Sambandsflokkurin biður ikki um peningaliga hjálp at keypa sær vinir, og vit ganga heldur ikki ørindi fyri onnur, sum samgongulimir Høgna hava ført fram. Sambandsflokkurin hevur eina politiska stevnuskrá, og við hava uppskot til eina nýskipan av føroyska samfelagnum, sum flokkurin hevur samtykt at virka fyri, og tað er tað vit gera.

Bæði stevnuskráin og nýskipanaruppskotið eru almenn.

**Trupulleikin hjá Høgna**

Vit siga, hvat vit vilja, og at við møguligum yvirtøkum skal fylgja gjaldsskylda. Vit hava eisini sagt við umboð fyri sitandi landsstýri á nógv umrøddu kaffifundunum, at teirra fullveldisætlan og samráðingaruppleggvar órealistiskt, og vit fingu rætt!

Nú hevur samgongan, og serliga Høgni Hoydal, fingið ein trupulleika at dragast við, tí nú kann danska stjórnin ikki brúkast sum vápn í fullveldisstríðnum.

Danski forsætisráðharrin hevur sagt tað sama vegna donsku stjórnina, sum fyrri forsætisráðharrin segði, at vilja føroyingar hava loysing, so fer danska stjórnin ikki at forða fyri tí. Hesu ferð var tað tó sagt í øðrum tóna, men boðini vóru greið – ikki arrogant og niðurlátandi, men klár og greið !

Helena Dam á Neystabø er farin úr samgonguni, so nú kann hon koma við uppskotum, sum hon vil, og gera sum hon vil, og løgmaður er farin ”á annað spor” í samráðingunum; eftir stendur ein ørkymlaður formaður í Tjóðveldisflokkinum, sum nú langar til høgru og vinstru, tí nú liggur bólturin í Føroyum.

At undirritaða skal hava nærum bønað og biðið Anders Fogh Rasmussen um ikki at ganga løgtinginum á møti, ella siga at yvirtøkurnar ikki bóru til, er pástandur, sum er so púra burturvið, at nú ber av !

Føroyingar, vit øll, hava fingið at vita **ikki bert eina ferð, men fleiri ferðir, og nú enn eina ferð,** at tað bar til, men avgerðin er okkara.

Tí hevur Høgni Hoydal ein stóran trupulleika, og ikki Sambandsflokkurin, men tað skal sláast fast, at Sambandsflokkurin fer at berjast móti fullveldisætlanum landsstýrisins, eisini um tær skulu krógvast undir heimastýrislógini og yvirtøkum.

---

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra kona, mamma, omma og vermamma okkara

**Brynhild Larsen**
Tórshavn

andaðist 19. januar 2002.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni týsdagin 22. januar kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*

**Lars, Marita og Annika**

---

# Tøkk

Øllum tykkum, ið vitjaðu inn á gólvið við gávum, blómum, fjarritum og uppringingum nær og fjar og á ein hvønn hátt vóru við til at gera gullbrúdleypsdagin hjá okkum hugnaligan og ógloymandi, vilja vit her siga hjartans tøkk og gott nýggjár øll somul.

**Emmy og Jóhan Norðfoss**



# Kurlan góðkend




*Barnagarðurin hjá Føroya Tele hevur fingið heitið Kurl@, eftir orðinum kurla, sum Jóan Hendrik Winter Poulsen hevur gjørt fyri @*

**Kurla er eitt rættiliga nýtt orð í føroyskum høpi. Kurla er nýggja orðið, ið er smíðað til at verða nýtt ístaðin fyri trant-a, snápul-a ella sum summi siga, att**

KURLA
*Ingrid Bjarnastein*



*Jóan Hendrik Winther Poulsen*

Smíðað orðið hevur Jóan Hendrik Winther Poulsen, sum starvast á Føroyamálsdeildini. Nú hevur barnagarðurin hjá Føroya Tele fingið heitið Kurl@ eftir nýggja orðinum kurla fyri @. Hvønn týdning hevur hetta fyri orðið sjálvt og merkir hetta kanska, at orðið fer at verða verandi í føroyska málinum framyvir. Sosialurin spurdi orðsmiðin, hvat hann sjálvur helt.

– Jú, tað er væl hugsandi, sigur Jóan Hendrik Winther Poulsen. – Føroya Tele og barnagarðurin hava valt at nýta hetta heitið, og kanska stimbra teir eisini orðinum á henda hátt. Hetta kann væl merkja, at uppskotið, sum eg kom við av fyrstan tíð er vorðið góðkent.

Jóan Hendrik Winther Poulsen sigur sjálvur, at hann hevði tað norska "krøll-alfa" í huganum tá hann kom við orðinum.

– Kurla er jú eitt føroyskt orð fyri krúlla. Snápul er ikki eitt gott føroyskt orð, og tá tú hyggur eftir tekninum sjálvum er sjálvur snápulin eitt sindur ov langur at vera ein snápul. Att er upprunaliga ein gomul, latínsk stytting, sum varð brúkt í rokniskapi. Ad, søgdu teir tá, og merkir tað hjá ella til.

Tað byrjaði við, at Jóan Hendrik skrivaði ein stubba til eitt av bløðunum um hesa góðu kurlu. Hann helt orðið hava ein ógvuliga skemtingarsaman dám, og tað vísir seg, at á onkran hátt hava fólk tikið við hesum.

– Hetta var bert eitt uppskot sum so mong onnur. Viðhvørt riggar tað, og viðhvørt ikki, sigur orðsmíðarin. –Alt er eitt sindur undarligt í byrjanini, tað gongur ein tíð áðrenn fólk hava vant seg við tað.

Tó skerst ikki burtur, at tað ljóðaði, sum málfrøðingurin var glaður fyri, at fólk hava tikið so væl móti nýggju kurluni, sum helst skjótt verður ein partur av okkara dagligu talu.

Frá Foreldrafelagnum:

# Barnaansing – rættur ella krav?

Foreldrafelagið, felagið fyri foreldur at smábørnum í Havn, hevur sett sær fyri, at seta nøkur týðandi mál á politisku dagsskránna í sambandi við komandi løgtingsval.

Tí skipar foreldrafelagið fyri almennum pallborðsfundi mikudagin 30 januar kl. 19.30 í Norðurlandahúsinum. Heitið á fundinum verður: "Barnaansing – rættur ella krav?". Dentur verður lagdur á at lýsa tey krøv sum verða sett barnafamiljum, og tey rættindi, sum hesar hava í einum nýmótans samfelag, serstakliga í sambandi við barnaansing, skúlafrítíðarskipan og frítíð annars.

Hóast hesi øki eru sera týdningarmikil í gerandisdegnum hjá tí einstaka, og hóast tey eisini eru grundarsteinar í samfelagsbúskaparligum vøkstri, verða tey ikki tikin í álvara av landspolitisku myndugleikunum.

Foreldrafelagið heldur, at hesi øki eiga at verða raðfest hægri av landspolitikarum, ikki einans í politiska kjakinum, men eisini tá talan er um at gera nakað veruligt við hesi álvarsmál.

